## Todi móti Lyn

**Ógvuliga nógv varð mánadagin gjørt burtur úr dramatisku hendingini leygarmorgunin, tá ið Todi endaði á sjúkrahúsinum**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Í kvøld klokkan átta fara Start og Todi Jónsson at spæla á heimavølli móti Lyn. Tað er ikki greitt, um Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu, men tað kann væl hugsast, at hann verður tað, um hann rættuliga er komin fyri seg eftir stóra skelkin leygardagin. Todi vandi við Start bæði í fyrradagin og aftur í gjár.

Í norskum og donskum fjølmiðlum varð í fyrrakvøldið nógv gjørt burturúr tilburðinum leygarmorgunin, tá ið Todi eina løtu var uttan vit og endaði í sjúkrahúsi.

Kona Toda, Andrea, verður endurgivin fyri at siga, at hon eina løtu kendi tað soleiðis, at Todi fór at doyggja. Eftir at hann hevði havt ógvuslig krampa herðindi og hevði givið ljóð frá sær, var hann lívleysur í eina løtu, áðrenn hon aftur fekk samband við hann.

Umframt orsøkirnar til líkfalsliga herðindi, sum Todi í gjár varð endurgivin fyri at siga her í blaðnum, verður lagt afturat, at íbúðarumstøðurnar ivaleyst hava viðvirkað til strongd. Síðani Todi kom til Kristiansand hevur hann búð á gistingarhúsi. Konan og øll trý børnini hava verið saman við honum, og hann hevur vant ógvuliga nógv.

Í hesi vikuni flytir Todi í nýggja íbúð. Spurningurin er so, hvussu tað fer at hilnast hjá honum á vøllinum í kvøld, tá ið Start fer at fáa vitjan av Lyn.

# Claus hevur skrivað undir nýggjan sáttmála

**Landsliðsspælarin hevur gjørt av at halda fram í Coventry í eitt ár afturat, og tað er møguleiki fyri, at hann verður í felagnum í uppaftur eitt ár afturat**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Um tvær vikur - mikudagin 17. august - verður HM undankappingardystur á heimavølli. Tá fara Føroyar at fáa vitjan av Kypros. Ítróttarliga tykist talan fara at verða um mest tøttu og harvið spennandi avbjóðingina, sum tað er møguleiki fyri í hesari undankappingini.

Uppgerðin verður á Svangaskarði. Takið hjá føroyska liðnum verður at fáa eitt uppaftur betri úrslit, enn tað var, tá ið Føroyar í oktober megnaðu 2-2 á Kypros.

Føroysku málini á Kypros skoraðu Claus Bech Jørgensen og Rógvi Jacobsen ella tveir av útisetunum.

Í gjár varð nevnt, at Rógvi Jacobsen og KR hava skift venjara. Tað hevur ikki gingið væl hjá KR, og hóast Rógvi hevur talst millum teir bestu, so hevur hann ikki havt sama eyðsýnda leiklutin í Íslandi, sum hann í fleiri ár hevur havt í føroyskum fótbólti. Men eingin ivi er um, at landsliðsvenjarin fer at senda boð eftir Rógva, og at hann er upplagdur møguleiki millum teir fyrstu ellivu.



*Landsliðsspælarin hevur gjørt av at halda fram í Coventry í eitt ár afturat, og tað er møguleiki fyri, at hann verður í felagnum í uppaftur eitt ár afturat*

### Sami arbeiðsgevari

Tá ið Claus Bech Jørgensen fyrr í summar var í Føroyum og spældi landsdyst ímóti Írlandi, var tað ikki greitt, hvar hann skuldi spæla fótbólt eftir summarsteðgin. Claus hevði tá tilboð frá feløgum í donsku superliguni umframt at Coventry, sum hann hevur spælt fyri tvey tey seinastu árini, vildi hava hann at halda fram í felagnum.

Tá ið hann var í Føroyum og spældi móti Írlandi, lá tað í luftini, at hann eisini næsta ár skuldi spæla í Coventry, og nú hevur 29 ára gamli Claus Bech Jørgensen gjørt av, at hann eisini næsta árið skal spæla í Coventry. Sáttmálin varð undirskrivaður fyri fýra vikum síðani.

- Umstøðurnar broyttust heilt í felagnum, tá ið Mickey Adams í vetur loysti Peter Reid av sum venjari. Eg kenni tað soleiðis, at hann hevur álit á mær. Eg var við í flestu dystunum, eftir at hann var komin í felagið, og í fyrireikingardystunum til nýggja kappingarárið havi eg eisini fingið nógva spælitíð, sigur Claus Bech Jørgensen.

Mickey Adams hevur rættuliga ruddað í spælarahópinum. Sáttmálaskeiðið hjá nógvum spælarum var runnið í summar. Umframt Claus Bech Jørgensen hava toppskjúttin Andrew Morrell, álopsspælararnir Gary McSheffrey, Trevor Benjamin og Dele Adebola, miðvallarin Stephen Hughes og verjuspælarin Richard Shaw skrivað undir nýggjar sáttmálar

Harafturímóti hevur venjarin ikki viljað longt samstarvið við veteranarnar Tim Sherwood og Steve Staunton, sum báðir áður hava verið á eingilska landsliðnum, og sum báðir síðsta kappingarár vóru nógv skaðaplágaðir.

Millum nýggju spælararnar í Coventry eru málverjin Clayton Ince, sum er keyptur úr Crewe, og álopsspælarin James Scowcroft, sum er keyptur úr Leicester. Fyri einari viku síðani boðaði hjálparvenjarin, fyrrverandi stórspælarin Adrian Heath, frá, at hann fór úr felagnum og til Derby County. Í gjár varð sagt, at hjálparvenjarin hevur iðrað seg um ta avgerðina, og nú heldur hann fram í Coventry, har hann er í høgum metum.

Málið hjá Coventry er at halda seg uppi í miðjuni í næstbestu deildini. Fyrsti landskappingardysturin verður nú leygardagin á útivølli móti Norwich.

- Eg gleði meg at fara undir nýggja kappingarárið. Tað er upp til mín sjálvan at gera av, um eg skal verða longri enn eitt ár afturat í felagnum. Í nýggja sáttmálanum stendur, at um eg spæli í minsta lagið helmingin av dystunum næsta ár, so skal sáttmálin leingjast við einum ári afturat, sigur Claus Bech Jørgensen, sum um tvær vikur aftur verður at síggja á landsliðnum móti Kypros.

Tá ið hann síðst spældi móti Kypros gekk tað bæði væl og minni væl. Í 1. hálvleiki var hann sera væl upplagdur, og hann skoraði eitt fínt mál við høvdinum. Eftir steðgin kom hann ikki á vøllin aftur. Hann hevði brotið óstbeinið, og tað helt honum burtur frá besta liðnum, inntil Mickey Adams um ársskiftið gjørdist venjari í Coventry. Síðani hevur tað gingið sum eftir ánni hjá Claus, og tað eigur at fara at koma føroyska landsliðnum til góða.

# KÍ skuldin fingin upp á pláss

**Kroati royndarvenur í Klaksvík, og í gjár skuldi gerast av, um Tony Paris næstu árini skal vera venjari í Klaksvík**

KÍ
*Jóannes Hansen*

Loksins er ein loysn funnin á, hvussu skil skal fáast á stóru skuldini, sum Klaksvíkar Ítróttarfelag hevur drigist við.

KÍ hevði kallað til tíðindafundar í gjárkvøldið klokkan 17.30. Í fráboðanini varð sagt, at tað eitt nú fór at verða kunnað um avtalu, sum felagið hevur gjørt við Norðoya Sparikassa og Klaksvíkar Kommunu um KÍ høllina.

Avtalan ber við sær, at eitt nýtt partafelag, sum Norðoya Sparikassi og KÍ eiga hvør sín helming í, skal yvirtaka høllina og harvið skuldina. Samstundis skal stuðulin frá Klaksvíkar Kommunu til høllina hækka so mikið, at tað bæði verður pláss fyri at avdraga skuldina og at gera íløgur, soleiðis at høllin, sum í mong ár hevur verið rættuliga slitin, skal umvælast. Eitt nú skal gólvið skiftast, og kjallarin innrættast soleiðis, at UEFA krøvini verða gingin á møti.

Fyrrverandi meistaravenjarin hjá KÍ, Tony Paris, hevur vitjað í Klaksvík síðani fyri Ólavsøku. Tað hevur ljóðað, at hann skal vera venjari hjá KÍ næstu árini. Á middegi í gjár var sáttmáli ikki undirskrivaður. Seinnapartin skuldi gerast av, um Tony Paris verður í Klaksvík næstu árini, ella um hann ikki verður har norðuri.

Í fráboðanini til tíðindafundin varð eisini sagt, at málini, sum felagið hevur sett sær fyri at røkka inntil 2009, skuldu leggjast á borðið á fundinum. Hetta verður vent aftur til í morgin.

Ein kroatiskur álopsspælari royndarvenji í Klaksvík mánakvøldið. KÍ hevur fingið samband við hann í Svøríki, har hann hevur spælt. Í vikuni skal gerast av, um hann skal spæla við KÍ tað, sum er eftir av hesum árinum.

KÍ er næstaftast í Formula deildini. Sunnudagin skulu klaksvíkingar spæla landskappingardyst í Runavík.